

## Eyðun og Terji á Skarv

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fara Eyðun og Terji á pallin á Skarv í Keypmannahavn.

Á skránni vera kendu sangirnir, sum teir hava spælt í bólkum sum Moirae, Føstufressum, Frændum, sum einstaklingar og saman á fløguni Eyðun & Terji. Á Skarvi siga tey, at tá Eyðun og Terji vitjaðu í fjør, var met sett við áskoðaratali. Ofta er plásstrot leygarkvøld á Skarv. Skarv fer framyvir at húsa livandi tónleik fríggjakvøldið. Fríggjakvøldini koma fleiri pør og vaksin fólk, sum eisini fara eitt sindur fyrr í býin. Tónleikurin á Skarv byrjar um midnátt bæði kvøldini. Meira á www.skarv.info.

## Høgni og Finnur í Århus

Leygardagin spæla Høgni Reistrup og Finnur Jensen fyri útisetum í Århus. Leygarkvøldið verður árliga Grýluveitslan í Áarstovu í Århus. Tá verður livandi tónleikur á skránni við Høgna Reistrup og Finni Jensen. Hýrurin plagar at vera góður, tá báðir havnarmenninir trubadurast í húsinum hjá Føroyingafelagnum, sum liggur mitt í Århus. Føroyafelagið hevur eisini aðalfund leygarkvøldið, men tað er fyrr um dagin.

Meir um grýluveitsluna og aðalfundin stendur at lesa á www.aarstova.dk.

# Føroyingar skikkiligast í heiminum

**Av øllum heimsins íbúgvum eru føroyingar teir, sum skikka sær best. Onga aðrastaðni í heiminum sita so fá fongslað sum í Føroyum. Fyri hvørji 100.000 fólk sita 15 føroyingar inni dagliga, og hetta er nógv minni enn nakra aðrastaðni**

FONGSUL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hesi tøl framganga í eini kanning, International Centre for Prison Studies í King's College í London hevur gjørt. Í kanningini luttóku 214 sjálvstøðug lond og ósjálvstøðug øki, har í millum Føroyar.

Hetta er sjeynda ferðin kanningin verður gjørd, og eftir hvørja kanning verður eitt yvirlit almannakunngjørt, ein listi, sum verður róptur World Prison Population List.

Sjeynda útgávan av World Prison Population List, sum kom út fyri kortum, fevnir um tíðarskeiðið millum tíðliga í 2004 og til oktober 2006. Í hesum tíðarskeiði eru umsitingin hjá teim ymsu fongslunum spurd eftir, hvussu tað sær út hjá teimum í mun til talið av innsettum fangum.

Tað eru hesi tøl, sum nú verða almannakunngjørd, og tað er her tað verður staðfest, at fyri hvønn íbúgva er tað ongastaðni í heiminum, at tað sita so fá fólk fongslað sum í Føroyum.



*Í mun til fólkatalið, er tað ongastaðni í heiminum so fá fólk handan rimar sum í Føroyum.*

### Bert sjey fólk um dagin

Sambært World Prison Population List sita dagliga í miðal 15 føroyingar inni fyri hvørji 100.000 fólk. Hetta grunda teir á, at tá teir í 4. oktober 2005 spurdu eftir í Føroyum, hvussu nógv sóta inni dagliga í miðal, var svarið 7 fólk. Samstundis varð upplýst, at tað búðu 47.000 fólk í Føroyum tá.

Hetta tal er nógv minni enn hjá nøkrum øðrum landi á listanum. Føroyar liggja langt aftast, men fyri einaferð skyld er tað flott at liggja aftast. Føroyar liggja eisini langt aftri á listanum, tá tað kemur til PISA-úrslit og styrkilistan hjá FIFA, men tað er vanliga ikki nakað, vit eru errin av.

Londini, ið liggja næst okkum á listanum, eru Nauru og Burkina Faso. Har sita dagliga 23 fongslaði í miðal um árið. Onnur lond, sum liggja aftarlaga eru Liechthenstein, Sierra Leone og Mali.

### USA fremst

Ísland er næsta grannaland okkara á listanum. Har sita í miðal 40 fólk inni dagliga fyri hvørji 100.00. Í Noreg er talið 66, Danmark 77 og Svøríki 82.

Ikki óvæntað liggur USA fremst á listanum. Langt fremst. Har sita dagliga 737 fangar fyri hvørji 100.000 fólk. Næst fremst er Russland, har í miðal 615 fólk sita inni um dagin fyri hvørji 100.000.

### World Prison Population List

Her síggja vit støðurnar hjá nøkrum tilvildarligum londum. Talið, sum stendur aftanfyri londini, er talið av fangum fyri hvønn 100.000 íbúgva.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | USA, | 737 | 152. | Svøríki, | 82 |
| 2. | Russland, | 615 | 157. | Danmark, | 77 |
| 8. | Palau, | 478 | 159. | Finnland, | 75 |
| 25. | Kasakstan, | 340 | 169. | Noreg, | 66 |
| 56. | Grønland, | 199 | 197. | Ísland, | 40 |
| 85. | Ongland, | 134 | 214. | Føroyar, | 15 |
| 128. | Italia, | 104 | | | |

# Arbeiðsmarknaðurin gjørt gott arbeiði

**Í einum lítlum samfelag hevur tú altíð kjans at fóta tær aftur, sigur Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini. Hon metir at føroyski arbeiðsmarknaðurin eigur stóra æru av, at talið ikki er hægri**

FONGSUL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Leiðarin á Kriminalforsorgini, Karin Kjølbro, heldur tað vera áhugavert, at Føroyar eru tað landið í heiminum, sum hevur fækst fangar sitandi inni per íbúgva.

Hon staðfestir, at lítla samfelagið vit liva í og sosiala eftirlitið eru tvær avgerandi orsøkir til hetta.

Karin Kjølbro hevur eisini hug at draga fram aðrar orsøkir, til lága talið.

– Kriminologiskt sæð er tað áhugavert hjá okkum, at av teimum, sum fáa treytaðan dóm ella eru royndarleyslatin, møta vit bara millum seks og átta prosentum aftur. Tað merkir, at av teimum áður revsaðu, eru tað ógvuliga fá, sum fremja nýggjan kriminalitet.

– Tað er ógvuliga lítið í mun til aðrastaðni, staðfestir Karin Kjølbro.

### Altíð kjans at fóta tær

Bæði Bent Jacob Hansen, varðhaldsleiðari, og varafútin, Finn Ougaard, eru samdir við Karini Kjølbro, um týdningin av at vit liva í einum so lítlum samfelag. Karin Kjølbro sigur eisini, at í einum lítlum samfelag hevur tú altíð ein kjans at fóta tær aftur. Og fremsta orsøkin til, at so mong av teimum, ið hava framt kriminalitet, finna fótafestið aftur, er, sambært Karin Kjølbro, føroyski arbeiðsmarknaðurin.

– Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur gjørt eitt stórt arbeiði her. Fyrr vóru tað serliga skipini, har hálvkriminellir dreingir vórðu sendir avstað við, og komu aftur sum raskir menn.

– Her er tað eitt undantak, at fólk undir Kriminalforsorgini ikki hava eitt



arbeiði. Aðrastaðni er tað regulin, sigur Karin Kjølbro, sum heldur at arbeiðsmarknaðurin hevur gjørt eitt megnar arbeiði her.